UTTAN ÚR HEIMI

# Fuglakrímið 1000 ferðir verri enn SARS

**Heimsheilsustovnurin WHO heldur, at fuglakrímið, sum herjar í Landssynningsasia, er túsund ferðir verri enn lungnasjúkan SARS. Samstundis halda amerikanskir og bretskir granskarar, at sjúkan líkist sponsku sjúku, sum kostaði meiri enn 40 milliónir mannalív fyri 85 árum síðani**

FUGLAKRÍM
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Avstralski vísindamaðurin John McKenzie samskipaði fyri einum ári síðani arbeiðið hjá heimsheilsustovninum WHO ímóti lungnasjúkuni SARS. Nú sigur hann, at fuglakrímið har eysturi í Asia kann gerast tann ringasta heimsumfatandi krímsjúkan.

- SARS var ein ávaring um, hvat ein umfarssjúka kann elva til, men fuglakrímið er ein túsund ferðir størri hóttan. SARS var einki samanborið við, hvat hetta kann enda við, sigur McKenzie við blaðið The Australian.

Higartil eru 18 fólk deyð av fuglakríminum. Sjúkan hevur gjørt mest um seg í Vietnam, men er eisini staðfest í fleiri øðrum londum, og í gjár váttaðu myndugleikarnir á Taiwan, at sjúkan eisini er komin hagar.

Serfrøðingar hjá WHO ávaraðu í gjár um, at fuglakrímið kann fara at gera um seg aðrastaðni, verða umfatandi tiltøk ikki sett í verk alt fyri eitt. Teir stúra serliga fyri, at virusið skal broyta seg, so sjúkan eisini kann smitta ímillum fólk.

## Líkist sponsku sjúku

Spanska sjúka var tann herviligasta umfarssóttin, sum rakti heimin í 20. øld. Hon herjaði beint eftir fyrra heimsbardaga og kravdi meiri enn 40 milliónir mannalív.

Nú halda amerikanskir og bretskir granskarar, virusið, sum elvdi til sponsku sjúku, var ógvuliga líkt virusinum, sum nú hevur elvt til fuglakrímið har eysturi í Asia. Í einari grein í tíðarritinum "Science" skriva granskararnir, at tað er serliga sjálvur smittuhátturin, ið líkist nógv.

Tað ber til at siga, at vit hava eina heimsumfatandi krímsjúku 30. hvørt ár, og tann seinasta var Hongkong-sjúkan, sum gjørdi um seg í 1968, men enn ber ikki til at siga, um fuglakrímið fer at gera so nógv um seg, sigur ein av bretsku granskarunum, Steve Gamblin.

Virusið, sum elvdi til sponsku sjúku, varð útruddað saman við sjúkuni, men í 1997 eydnaðist tað svenska granskaranum Johan Hultin at finna tað í einari kvinnu í Alaska, sum var deyð av sjúkuni. Líkið hevði ligið í teirri køldu jørðini har í 80 ár, og í lungunum fann Johan Hultin virusið frá sponsku sjúku. Síðani hava vísindafólk endurbygt tey flestu genini í virusinum.



*Fuglakrímið er nógv størri hóttan enn SARS og líkist sponsku sjúku, sum kravdi 40 milliónir mannalív í 1918*

*Mynd: Reuters*

HALDIÐ SOSIALIN
400,- um ársfjórðingin
- sparið 380,- í mun til leysasølu
600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)
Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Ókeypis
Verður sent óposta̧ð
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

VARPIÐ
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+
DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel
Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel •
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Vikuskifti

Nr. 26 • leygardagur • 7. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tónleikurin er dreymurin



Samrøða við Petsi Tvørfoss, sum verður við í donsku Grand Prix kappingini í kvøld

Lesið síðu 4-5



*Hans Petur í Brekkunum og hinir í Take Off spæla fyri føroyingum í Danmark, og tað gera teir væl við góðum popp- og discotónleiki*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Flúgvandi Take Off

Føroyskur popp- og discotónleikur ljómar í Føroyingahúsinum, tá ið Take Off stendur á plakatini. Føroyingar nýta høvið til at hittast í hugnaligum selskapi og fáa góðan tónleik at dansa til

TÓNLEIKUR
*Jonhard Hammer*

**Keypmannahavn:** Føroyingahúsið í Keypmannahavn er miðdepil fyri nógv føroysk tiltøk í danska høvuðsstaðnum, og soleiðis er eisini hetta kvøldið, nýggj samgonga er skipað í Føroyum.

Tað er neyvan nakar, sum hugsar stórvegis um søguliga dagin í føroyskum politikki, og tey, sum hava ein feril av politikki í tonkunum, tá ið tey fara í Føroyingahúsið, gloyma tað skjótt í svingandi rútmunum hjá føroyska poppbólkinum Take Off.

Væl smurdi bólkurin spælir til dans, og teir spæla bæði sangir, sum teir sjálvir hava gjørt, og sangir hjá øðrum.

## Flúgva til framførslu

Take Off er vanliga mannaður við trimum føroyingum og tveimum dønum, men hetta kvøldið er bara ein danskur tónleikari við í bólkinum.

Gittarspælarin Jønne hevur eina aðra tónleikaliga uppgávu, og tí hevur bólkurin sett boð eftir einum ungum tónleikara úr Føroyum. Tað er Sveinur Dam, sum hetta kvøldið slær á teir seks streingirnar til melodiøsa popp- og discotónleikin hjá Take Off, og hann er flogin niður sama dag.

Tað er ljómborðsspælarin og blásarin Ólavur Olsen eisini.

Hann var eymur sum keyboardið hjá sær, og hann ansar væl eftir, tá ið lastamenninir skulu fáa ljómborðið hjá honum upp í flogfarið hjá Atlantic. Og tá ið flogfarið hevur lent í Keypmannahavn, fær hann ljómborið borið upp, so hann sjálvur sleppur at draga tað ígjøgnum móttøkuhølini.

## Århus er miðdepil

Take Off er í ein útisetabólkur. Tað vóru føroyingar í Århus, sum settu gongd á tónleikaliga samstarvið í bólkinum, og teir tríggir, Hans Petur í Brekkunum, Charlie Simonsen og Ólavur Olsen, spælir framvegis allir í bólkinum.

Hans Petur og Charlie búgva framvegis í Århus, og tað gera teir báðir donsku tónleikararnir í bólkinum somuleiðis. Fimti limurin er fluttur heim, men tað ber væl til at mobilisera allar kreftirnar til tiltøk í Føroyum og Danmark.

Í fjør kom Take Off við síni fyrstu fløguútgávu, sum teir kallaðu »Blandað bomm fyri rest«. Tónleikin tóku teir upp í Århus, og sangirnar skrivaðu teir sjálvir.

## Nakað serligt

Take Off spælir melodiøsan popptónleik, men teir blandað nógv discotónleik upp í poppin, so tað bæði svingar og bankar, tá ið teir pumpa við øllum ventilum.

Sangarin Hans Petur í Brekkunum og ljómborðsspælarin Ólavur Olsen hava báðir konservatoriútbúgving, og teir eru báðir blásarar. Teir brúka hornini hjá sær í tónleikinum hjá Take Off, og tað gevur tónleikinum hjá bólkinum nakað serligt. Teir ljóða ikki sum nakar annar føroyskur bólkur, og tá ið teir tríva í góðar, gamlar discotravarar, er tað framúr.

Men sangirnir, sum teir sjálvir hava skrivað, standa eisini mát til dansigólvið, og tey góðu løgini og væl skipaði tónleikurin er ein fragd fyri oyrað.

## Hitta fólk

Eitt slíkt tiltak í Føroyingahúsinum savnar nógv fólk, og tað eru ymisk fólk. Fólk í leiðandi størvum eru komin í húsið, og nógv ungfólk eru eisini komin á gátt. Føroyingar, sum eru í staddir í Keypmannahavn í ørindum, nýta slíkt gylt høvi til at hitta útisetar og hugna sær við góðum tónleiki og selskapi.

Og prátið gongur lívliga – men kanska ikki so nógv um nýggju samgonguna heima í Føroyum...